**Tit ringja — vit skriva**
Er nakað á vási? — Ivamál?
Ein spurningur, ella tíðindi, so ring til okkara.
Vit eru til reiðar!
Telefon 118 20 - Telefax 147 20

tíðindablaðið **sosialurin**

**Lýsingar**
Lýsingarfólk okkara er ráðgevari hjá fyritøkum og einstaklingum í lýsingarspurningum. Hetta verður gjørt uttan meirkostnað fyri lýsaran
Telefon 118 20 - Telefax 147 20

## veðrið

**Ein veikur hátrýstryggur fer yvir Føroyum, og lýtt luftrák verður aftur eitt skifti av útsynningi móti Føroyum. Eitt lágtrýst við tilhoyrandi brúgvaløgum rekur móti Føroyum hósdagin.**

**Týsdagin:**



**Lot upp í friskt lot, 5–10 m/s, av landssynningi, lutvíst ádrigið, men mestsum turt, gott sýni og sólarglottar, tó kanska mjørkaflókar. Mesti hitin 15 stig, um náttina niður í 8 stig.**

**Mikudagin:**
**Lot upp í gul, 5–8 m/s, av landssynningi og suðri, lutvíst ádrigið, turt men annars gott sýni og sólarglottar, tó kanska mjørkaflókar, Hitin millum 10 og 15 stig.**

**Hósdagin:**
**At byrja við bert upp í lot, undir 5 m/s, av ymsum ættum, lutvíst ádrigið, men turt og gott sýni og sólarglottar, men kanska mjørki í støðum. Út á dagin friskandi til millum hvassan vind og skrið, 15–20 m/s, av suðri, ádrigið, versnandi sýni og regn sum frá líður. Hitin millum 10 og 13 stig.**

**Fríggjadagin og leygardagin:**
**At byrja við framvegis millum hvassan vind og skrið, 15–20 m/s, av suðri, ádrigið, regn og bert toluligt ella vánaligt sýni, seinni minkandi vindur av vestri, minni avfall og betri sýni. Hitin millum 10 og 13 stig.**

## óli teknar

©1994 Sosialurin/Óli Petersen

*Smuthullet*




Støðan er spent í norðurhøvum

SJÓNVARPSTÆNASTA
RADIOTÆNASTA
ANTENNUARBEIÐI

Vit gera alt og selja mangt. Altíð góð tilboð. Skjót og góð avgreiðsla.

RADIOHANDILIN
v/ E. & P. Persson p/f
N. Finsensgøta 1b Tlf. 18277

FLOGFERÐASEÐLAR
Atlantic Airways
SAS
DANAIR
ICELANDAIR
TLF. 15900
-títt ferðasamband við úttheimin!

BT palletvognar
2000 og 3000 kg
Gaffillongd 910 og 1150 m/m
Eru á goymslu.
Kaj Andreasen Pf.
Klingran 5 - Hoyvík - Tlf. 15600

# Sigldi fullur um Leirvíksfjørð

Leygarkvøldið tók politiið í Klaksvík ein mann, sum við góðari kenning sigldi.

Maðurin var farin í opnum báti til Leirvíkar við tveimum monnum, sum har vórðu settir á land.

Úr Leirvík fekk politiið í Klaksvík at vita, at hin triði var á veg til Klaksvíkar aftur, og tá hann so hevði lagt bátin við eina bátabrúgv, tók politiið ímóti honum.

Á vegnum úr Leirvík hevði maðurin tikið ein havhestaunga til døgurða sunnudagin.

Maðurin verður møguliga skuldsettur fyri at hava sigit ávirkaður.

**Suzuki jeepur**
árg. 88, til sølu.
Tlf. 13831

**Flogferðaseðil**
aftur og fram til Álborg 25. august og aftur 25. september, til sølu fyri 2.200 kr.
Tlf. 12487

**Eliaskirkjan,** Vesterbrotorv 49
Møti er hvørt leygarkvøld kl. 19.00.
Bussarnir 6, 16, 28 og 41 steðga nærindis.
Nærri fæst at vita á tlf. 031-242268 ella 031-578999.

randi

## Vestfalskyrrindi

21. august: Fullmáni
27. august; Mánin longst frá jørðini
29. august: Seinna kvarter

| Dato | Suðuroyar-/ Vágafirði fp. sp. | Vestmannasundi fp. sp. | Nólsoyarfirði fp. sp. | Haraldssundi/ Leirvíksfirði fp. sp. | Skávoyarfirði/ Skopunarfirði fp. sp | Hestfirði/- Sandalagnum fp. sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 23. aug. | 0855 2116 | 1055 2316 | 0710 1931 | 0910 2131 | 0755 2016 | 0810 2031 |
| 24. aug. | 0938 2159 | 1138 2359 | 0753 2014 | 0953 2214 | 0838 2059 | 0853 2114 |